Bjarni Kárason Petersen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um stuðul til ferðavinnufyritøkur, ið eru skrásettar eftir 12. mars 2020, settur landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Veit landsstýrismaðurin dømi um fyritøkur, ið eru skrásettar eftir 12. mars, ið hava roynt at søkt um stuðul sambært løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í samband við COVID-19, men har umsóknin ikki er gingin á møti?
2. Hvør er grundgevingin fyri bert at veita stuðul til fyritøkur, ið eru skrásettar áðrenn 12. mars 2020?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at gera nakað fyri at tryggja at fyritøkur, ið eru skrásettar eftir 12. mars 2020, kunnu fáa stuðul sambært løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í samband við COVID-19, eins og fyritøkur, ið eru skrásettar áðrenn 12. mars 2020?

Viðmerkingar:
Í Hjálparpakka 3 stendur, at tað bara eru fyritøkur, ið eru stovnaðar áðrenn 12. mars 2020, ið kunnu søkja hjálparpakkan.

26. juni samtykti Løgtingið at broyta matstovulógina soleiðis, at landsstýrismaðurin í vinnumálum fekk heimild at broyta afturlatingartíðirnar hjá matstovum og skeinkingarstøðum. Varð kunngerðarheimildin nýtt, høvdu matstovur ella skeinkingarstøð rætt til stuðul eftir løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 (LM-147/2019).

7. august 2020 kom kunngerð í gildi um, at skeinkistøð skuldu lata aftur kl 23, inntil 31. august 2020, tá ið kunngerðin fór úr gildi.

Í lógini um stuðul til ferðavinnufyritøkur stendur, at bert fyritøkur, ið eru stovnaðar áðrenn 12. mars 2020, hava atgongd til stuðulsskipanina.

Men tað eru dømi um, at fyritøkur hava skrásett seg eftir 12. mars 2020, og sum hava havt vinnuligt virksemi frá 12. mars at rokna.

Hetta er ein avbjóðing fyri tey í vinnuni, ið hava havt nógv fyrireikingararbeiði við at stovna ella víðka vinnuligt virksemi. Hesi eru ikki javnsett við onnur í vinnuni, og fáa ongan stuðul í samband fastar útreiðslur.

Hetta kann elva til, at nýliga stovnaðar fyritøkur við nógvum fyrireikingararbeiði ikki eru meira enn komnar í gongd, áðrenn tær skulu stúra fyri, at tær møguliga mugu snara lykilin aftur.

Á Løgtingi, 23. november 2020

Bjarni Kárason Petersen